BÚ- & HEIMATÆNASTAN
Í SUÐUROY
VIRÐISGRUNDARLAGIÐ

# Í TRYGGUM HONDUM

**Við nærlagni og nærveru tryggja vit borgaranum fyribyrgjan, umsorgan og røkt út frá tørvinum hjá tí einstaka**

STARVSFÓLKINI

# Tað sum eyðmerkir sambandið millum starvsfólkini er

# VIRÐING

# MENNANDI SAMSTARV

# SAMANHALD







## VIRÐING

- Virðing er grundarsteinurin undir einum góðum arbeiðsumhvørvi.
- Vit virða ymisleika hjá hvørjum øðrum.
- Vit skapa álit við virðiligum samskifti.
- Vit siga tað við rætta viðkomandi, um okkurt er.
- Vit virða reglugerðir, tagnarskyldu og uppmøting.
- Vit steðga happing.

## MENNANDI SAMSTARV

- Við góðum tvørfakligum samstarvi stuðla vit hvørjum øðrum persónliga og fakliga.
- Vit skjalfesta okkara arbeiði.
- Vit eru opin fyri samstarvi við aðrar fakbólkar.
- Vit geva okkara vitan víðari.
- Vit hjálpa og stuðla hvørjum øðrum.
- Vit ráðgeva og vegleiða, har tað tørvar.

## SAMANHALD

- Við opinleika, sannføri og tolsemi skapa vit trivna, nøgdsemi og arbeiðsgleði.
- Vit viðurkenna styrkir hjá hvørjum øðrum og geva herðaklapp.
- Vit lurta aktivt, tá ið vit tosa við hvønn annan.
- Vit geva hvørjum øðrum eina hjálpandi hond.
- Vit tora at geva og móttaka konstruktivan kritikk.
- Vit hava felags tiltøk.

BORGARIN

# Tað sum eyðmerkir okkara samband við borgaran er

# HEILDARMYNDIN
# VIRÐING
# NÆRVERA





## HEILDARMYNDIN

- Vit veita eina heildartænastu, fyri at borgarin kennir seg sum eitt heilt menniskja.
- Skriva lívssøguna hjá borgaranum.
- Gera røktarætlan fyri borgaran.
- Skipa fyri andaligum løtum.
- Skipa fyri sosialum tiltøkum.
- Skipa fyri venjingum.

## VIRÐING

- Vit virða sjálvsavgerðarrættin hjá tí einstaka fyri at varðveita lívsgleði og lívsgóðsku.
- Vit "banka uppá".
- Vit lurta aktivt, tá ið borgarin tosar.
- Vit tosa virðiligt við borgaran og vanda okkum um orð og tónalag.
- Vit skapa virðiligar umstøður, tá ið vit veita persónliga røkt.
- Vit virða borgarans ynskir og fremja tey so vítt møguligt.

## NÆRVERA

- Vit menna sjálvsvirðingina hjá tí einstaka, fyri at varðveita kensluna av at gera mun.
- Vit tosa ikki yvir høvdið á borgaranum.
- Vit brúka ikki telefonina til persónliga nýtslu inni hjá borgaranum.
- Vit eru til staðar við okkara kropsmáli og fysiska sambandi.
- Vit geva okkum tíð til eitt prát.
- Vit eru tolin, tá ið vit veita umsorgan og røkt.

STOVNURIN

# Tað sum eyðmerkir stovnin er

# VIRÐING

# SAMSTARV

# GÓÐ TÆNASTA




## VIRÐING

- Vit vísa virðing, álit og umsorgan fyri tí einstaka.
- Vit møta tí einstaka, í tí støðu viðkomandi er í.
- Vit virða ymisleika og lívsáskoðan hjá tí einstaka.
- Vit hava álit á, at øll loysa sínar uppgávur til fulnar.
- Vit vísa umsorgan, tá ið tann einstaki hevur tað trupult og kennir mótgongd.

## SAMSTARV

- Við góðum samstarvi, tryggleika og trivnaði tryggja vit bestu tænastuna.
- Við góðum samskifti kunna vit nýggjar borgarar og teirra avvarðandi.
- Vit samstarva við tey avvarðandi og taka tey við í viðurskiftini hjá teirra kæru.
- Við samstarvi við aðrar stovnar og felagsskapir skapa vit eitt livandi heim og trivna.
- Við samskifti við læknar og sjúkrahús tryggja vit røttu viðgerðina.
- Við tvørfakligum samstarvi tryggja vit eina góða heildartænastu.

## GÓÐ TÆNASTA

- Vit stremba í móti at veita ta bestu tænastuna við nøgdum borgarum, avvarðandi og starvsfólki.
- Vit hava starvsfólk við best møguligum førleikum, sum søkja sær vitan og førleikamenna seg.
- Vit tryggja neyðugu hjálpitólini.
- Vit tryggja, at tænastan verður veitt við støði í tørvinum hjá tí einstaka.
- Vit tryggja eitt gott samband við avvarðandi.
- Vit eru sjónlig, atkomulig, forstáðilig og jalig.

BÚ- & HEIMATÆNASTAN
Í SUÐUROY

**Bú- og Heimatænastan í Suðuroy**
Eiðisvegur 28
900 Vágur
Tlf. 79 35 00
Teldupostur: bhs@bhs.fo